# Atlantic Airways 12,3 milliónir í avlopi í 2010

**Úrslitið hjá Atlantic Airways í 2010 var munandi betri enn í 2009. Eftir skatt var avlopið í fjør 12,3 milliónir krónur samanborið við eitt hall á 6,6 milliónir krónur í 2009**

Eirikur Lindenskov

Avlopið var 15 milliónir krónur fyri skatt samanborið við eitt hall í 2009 á 8 milliónir krónur fyri skatt.

Tiltøkini, sum Atlantic Airways setti í verk, eftir at altjóða fíggjarkreppan av álvara tók dik á seg í 2008, hava givið úrslit, og hallið í 2009 vendist í 2010 til eitt avlop á 12,3 milliónir krónur eftir skatt.

Hetta hendi, hóast avbjóðingarnar hjá felagnum vóru stórar í fjør, m.a. orsakað av øskuskýnum úr Eyjafjallajökli, ið kostaði felagnum 5 mió. kr. í eykaútreiðslum, og nógv hækkaðum avgjøldum á flúgving bæði í Føroyum og Danmark.

Atlantic Airways hevur síðan á sumri í 2009 áhaldandi lagað sítt virksemi til umstøðurnar, ið tóku seg upp orsakað av fíggjarkreppuni. Flogførini eru færri, ein tyrla er seld, og starvsfólkatalið er lækkað úr 205 í 2009 niður í 167 í 2010. Í 2008 var starvsfólkatalið 277.

- Vit eru fegin um, at raksturin aftur er komin á beint. Felagið hevur seinastu tvey árini arbeitt sera hart fyri at røkka hesum úrslitinum, og øll starvsfólkini frá ovast til niðast eiga æruna av, at vit hava vent hallinum til eitt avlop, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Avbjóðingarnar hjá Atlantic Airways eru kortini framvegis stórar, vísir hann á.

- Flogverksmiðjan Airbus letur felagnum nýggja Airbus 319 flogfarið í mars 2012, og hetta krevur nógvar fyrireikingar. Longdi flogvøllurin hevur eisini aðrar møguleikar og avbjóðingar við sær, og vit vilja fegin víðka um útboðið av ferðamøguleikum loftvegis. Vit kunnu sjálvi virka fyri, at raksturin verður effektiviseraður, men at minka um avgjøldini á flúgving mugu myndugleikarnir taka sær av, sigur Magni Arge.

Á grundrakstrinum øktist inntjeningin hjá felagnum úr 43,6 milliónir krónur í 2009 upp í 69 milliónir krónur í 2010. Økingin var 58 prosent. Samlaða sølan í 2010 var 403 milliónir krónur, ið er á sama støði sum árið fyri. Raksturin gjørdist í munandi meira lønandi. Eginpeningurin er 227 milliónir krónur og solvensurin 56 prosent. Nevndin mælir til, at partaeigararnir fáa 7,5 milliónir krónur í vinningsbýti.

Atlantic Airways metir, at útlitini fyri raksturin í 2011 eru hampilig, men ein møgulig framgongd er nógv tengd at prísinum á brennievni, sum í løtuni er høgur og torførur at spáa um.

**7,5**
**mió**
**í vinningsbýti**

## Fakta

Starvsfólk 2008: 277
Starvsfólk 2009: 205
Starvsfólk 2010: 167



# Hægri ferð og lægri prísir

**Føroya Tele broytir nú prísbygnaðin á breiðbandinum grundleggjandi. Tær høgu ferðirnar verða tvífaldaðar, og prísirnir verða settir nógv niður, so at meira fæst fyri pengarnar**

Eirikur Lindenskov

– Vit vilja bjóða fólkum ta ferð og tað breiðband, sum krevst, um vit skulu fylgja tí alsamt skjótari streyminum og standa okkum millum framkomin lond. Føroya Tele kennir tað sum sína ábyrgd at ganga á odda at veita føroyingum dygdargott og tíðarhóskandi breiðband, og nú er tíðin búgvin at fremja ein nýggjan prísbygnað.

Soleiðis sigur Kristian R. Davidsen, stjóri í Føroya Tele, sum í morgun boðar frá munandi prís- og ferðbroytingum á breiðbandshaldum.

Higartil hava bíligastu privatu breiðbandshaldini kostað 380 krónur um mánaðin, tey dýrastu hava kostað 825 krónur um mánaðin. Nú verður hetta spennið broytt, við tað at tey størru haldini fara niður í 449 og 499 krónur, samstundis sum ferðin verður tvífaldað ella meira. Tað vil siga, at einans 119 krónur nú vera á muni millum eitt 2 Mbit-hald og eitt 20 Mbit-hald.

Broytingarnar koma í gildi frá 15. mars, tá ið allar tøkniligar tillagingar eru gjørdar.

### Meira ferð fyri minni pengar

Í stuttum snýr prísbroytingin seg um, at privatkundin fær meira ferð fyri minni pengar.

## Fakta

**Haldini hava higartil sæð soleiðis út:**

| Verandi hald | |
|---|---|
| 2 Mbit | 380 kr/mðn |
| 4 Mbit | 470 kr/mðn |
| 6 Mbit | 620 kr/mðn |
| 10 Mbit | 825 kr/mðn |

**Eftir broytingina fara haldini at síggja soleiðis út:**

| Nýggj hald | |
|---|---|
| 2 Mbit | 380 kr/mðn |
| Upp til 8 Mbit | 449 kr/mðn |
| Upp til 20 Mbit | 499 kr/mðn |

Ferðin á haldum verður gjørd upp í Mbit/sekund. Í faktaboksini downloadferðin umrødd, tað vil siga tíðin tað tekur at flyta upplýsingar á sína teldu. Uploadferðin er ídag 512 kbit á øllum haldum. Frameftir verður uploadferðin 512 kbit á 2 Mbit-haldum, men hon verður hækkað til 1 Mbit á 8 Mbit- og 20 Mbit-haldunum.

Við prísunum henda nakrar broytingar heilt av sær sjálvum, sum koma viðskiftafólkum til góðar:

1. Tey, sum í dag hava ferðina 4 Mbit fáa av sær sjálvum 8 Mbit, og prísurin verður settur úr 470 krónum niður í 449 krónur um mánaðin.
2. Tey, sum í dag hava ferðina 6 ella 10 Mbit/s verða flutt upp í 20 Mbit/s, og prísurin verður minkaður úr ávikavist 620 krónum og 825 krónum um mánaðin niður í 499 krónur um mánaðin.

Í fyrstu syftu verða ongar broytingar fyri tey minstu haldini, tað vil siga 2 Mbit. Hinvegin ber til hjá einum viðskiftafólki við minsta haldinum at ferfalda sína ferð fyri slakar 70 krónur um mánaðin.

### FT lækkar kostnaðarstigið

Í fráboðan ásannar Føroya Tele, at tað er ein avgerandi liður í menninginum hjá einum landi, at so nógv sum gjørligt hava atgongd til internetið við so høgari ferð og so lágum kostnaði sum gjørligt.

– Við teimum nýggju prísunum nærkast vit altjóða prísleguni. Tann munurin, sum framvegis er at síggja í prísinum samanborið við umheimin, kemur í høvuðsheitum frá, at vit noyðast at rinda eitt eykagjald fyri sjókaðalarnar út í heim, umframt at vit eru ein lítil marknaður uttan stórrakstrarfyrimunir, sigur Kristian R. Davidsen.

– Við okkara nýggju prísum gera vit eitt skarvslop tann rætta vegin. Ein høvuðsorsøk til, at Føroya Tele nú megnar at lækka prísirnar er, at fyritøkan seinastu árini miðvíst hevur lækkað kostnaðarstigið at reka fyritøkuna. Haraftrat er tann tøkniligi parturin nú mentur soleiðis, at vit kunnu veita flestu føroyingum ta hægst møguligu ferðina til kappingarføran prís, sigur Kristian R. Davidsen, stjóri.

**20 mbit**
**499 kr.**